# BØNARLØTAN

**OKTOBER** **2023** **38. árg.**

## *1. Sunnudagur* *Op. 17. 1-18*



**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 10, Micah 10**

Samkomulegan er júst nú, 29. sept. - 1. okt., í Jurafjøllunum. Biðið, at legan verður uppbyggjandi, og at øll tey nýggju í samkomuni kenna seg væl, serliga børnini. Vit takka fyri nýggju húsini, sum liggja nærri samkomuni – kortini skulu nógvar umvælingar gerast.

**Birgit og Svenning av Lofti**

Tænasta okkara: 1. okt. Hermon í Nordepli, 5-12. okt. í Randers, 21-22. okt. Zion í Kollafirði, 26-30. okt. bíbliuferð við Norrønu. Takk fyri trúfasta forbøn.

**KRINGVARPIÐ**
1. okt. útvarpsmøti, Zarepta
1. og 8. okt. sjónvarpsandakt, Tóra við Keldu

**EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv. kl. 21.00........ Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21.00........ Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Mánadagur* — *2. Mós. 26. 1-14*

**DANMARK, Kristnastova**
**Susan og Øssur Berghamar**



Nú fimti ár eru farin, síðani verkið í Kristnastovu byrjaði, er tað umráðandi, at vit framvegis lurta eftir rødd Harrans og møta tíðarinnar átrokandi tørvi. Samfelagið er nógv broytt hesi árini, men tørvurin er framvegis stórur. Takk fyri samfelag, stuðul og forbøn! berghamar@kristnastova.dk

## *3. Týsdagur* — *Op. 18. 1-24*

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**
Seinastu vikurnar hava vit riggað nýggja næmingaheimið til. Bíbliuskúlin er júst byrjaður. Biðið, at nýggju næmingarnir falla væl til. Í okt. fara vit á ráðstevnu saman við átta nýggjum samkomum, sum fegin vilja stuðla trúboðanarverki í ættarbólkum.



**ZAREPTA**
Heystlega fyri 15-17 ár verður 6. - 11. okt. Jan Zachariassen skipar fyri deyvastevnu í Zarepta 30. okt. - 4. nov.

*Í dag fyllir Nana Mortensen 12 ár

## *4. Mikudagur* *2. Mós. 26.15-37*

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**
4. okt. fari eg eina viku á stóra stevnu í Barcelona. Síðani fari eg til Føroya at vitja samkomur 16. okt. - 9. nov. Vit hava eina stevnu í Zarepta 30. okt. - 4. nov., har deyvabíbliutýðarar luttaka.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

## *5. Hósdagur* *Sálm. 105*

**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**



Logos Hope fer úr Kenya til Tansania 5. okt. Doulos Hope er í Malaisia og fer til Tailands 14. okt. Biðið fyri skipunum og fyri Logos Hope-døgum í Føroyum. Esther Dam Hansen kom heim í sept. eftir 1 ár umborð á Logos Hope. Pætur Midjord og Ellintur og Eyðgerð Abrahamsen eru enn umborð. Biðið Harran leiða og varðveita tey og øll hini umborð. Innsavning til olju verður í Logos Hope-vikuni 17-27. okt., tá eisini Myles kemur at vitja. Takk fyri framhaldandi stuðul.

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

## 6. Fríggjadagur Op. 19. 1-21



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Biðið fyri mær og mixtectoyminum, sum vit halda á at endurskoða Matt.-evangeliið, sum umsetingarráðgevi skal rættlesa. Biðið eisini fyri Sue. Hon er í USA til kemoviðgerð fyri sjáldsama eitlasjúku. Biðið um grøðing!



**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

Eg greini tekstin í Rómbr., so fólk á Filipsoyggjum kann brúka hann í undirvísingini. Rómbr. er so ómetaliga ríkt og grundleggjandi. Kap. 8 byrjar við *ongin fordøming* og endar við *ongin skilnaður*. Takk fyri forbøn! Vit takka Gudi fyri høvið at vera við í verkinum.

## 7. Leygardagur 2. Mós. 27. 1-21



**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**

Nógvir næmingar eru komnir á skúlan hetta semestrið. Minnist tey, sum tey royna at falla til og fara undir nýggja útbúgving. Vit bæði eru partur av 3C-starvsliðnum, har vit m.a. undirvísa teimum, sum ætla at fara út sum trúboðarar.

*Í dag fyllir Jónatan Tuohy 14 ár

## *8. Sunnudagur* *Op. 20. 1-15*

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**

12. sept. vórðu vit signað við eini dóttur, sum eitur Hanna. Alt gekk væl, og vit eru takksom fyri hesa gávu. Takk fyri forbøn - alt er av Guds náði.

## *9. Mánadagur* *2. Mós. 28. 1-21*

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**



Daniel skal hava skurðviðgerð í nakkanum, helst skjótt. Vit hava framvegis bíbliutímar annanhvønn hósdag umvegis netið við fólki í Qasigiannguit. Tey skiftast um at hittast í trimum ymiskum heimum. Vit takka Gudi fyri góðu gongdina og góða uppmøting. Vit hava nú eisini bíbliutímar heima í Kalifornia.

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 17, Lydia 6**

## *10. Týsdagur* *Op. 21. 1-14*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**

Vit eru í Pakistan til síðst í okt. Vit vitja samkomur og knýta sambond fyri at leggja grundvøllin undir framtíðar trúboðanararbeiði í landinum. Biðið Harran um at brúka okkum, varðveita okkum frá illum og sjúkum og at opna dyr.

Vit greiða frá túrinum og arbeiðnum regluliga á FB-bólkinum: Missión Johannesen Familjan

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 12, Tabita 9, Debora 8, Natan 5**

## *11. Mikudagur* *2. Mós. 28. 22-43*

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**
Summarið gekk væl, men røddir í fjølmiðlunum funnust at parti av kristna boðskapinum. Biðið, at virksemið heldur fram og fyri teimum, sum komu til trúgv.

## *12. Hósdagur* *Sálm. 106. 1-23*

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 17, Rebekah 15, Lydia 13**



Mær tørvar tykkara forbøn nú eg, Claire, fari úr OM. Eg haldi tó fram í tænastu míni at venja og vegleiða nýggjar trúboðarar saman við leiðsluni í trúboðaratoyminum. Eg takki fyri Guds leiðslu. Arbeiðið við handbókini fyri trúboðarar heldur á; hendan mánaðin skal eg skriva kapittulin *Persónlig Vegleiðing Ger Mun/Personal Support Matters* lidnan. Mær tørvar vísdóm og áhaldni.

## *13. Fríggjadagur* *Op. 21. 15-27*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**
Vit eru Harranum takksom, at seks grønlendskar kvinnur hava tulkað og hjálpt til á legunum í summar. Tær ganga allar inn fyri sakini, og tær vitja okkum eisini framvegis heima í Qaqortoq.

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**
Leygarkvøldið 16. sept. kom Juvel II aftur á Klaksvík eftir væl eydnaða trúboðanarferð bæði í Vestur- og Eysturgrønlandi. Stóra takk fyri stuðul og forbøn!

## *14. Leygardagur* *2. Mós. 29. 1-21*

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**
Biðið fyri møtunum sunnud. og hóskv., fyri sunnudagsskúlanum og barnamøtunum! Nú ítróttur o.a. byrjar aftur, koma ikki so nógv børn sum fyrr. Biðið, at sambandið, sum var millum hjálparfólk úr Føroyum og tey ungu og børnini her, heldur fram á netinum.

## *15. Sunnudagur* *Op. 22. 1-21*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 14**
Bókhaldsskipanin er nú vorðin gomul og kann ikki longur dagførast, so hon má skiftast. Hetta arbeiði byrjar 15. okt., og vónandi

riggar nýggja skipanin fyrst í nov. Biðið, at arbeiðið gongur væl, og at allar hendur verða tøkar.

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**

**FØROYAR**
- **Elin og Jógvan Jacobsen**
- **Unn og Jógvan Zachariassen**
- **Lis Zachariassen**
- **Annika og Poul Færø**
- **Anna og Óli Steinberg**
- **Maria og Jens Bech**



## *16. Mánadagur* *1. Sám. 15. 20-35*

**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**
Alsamt fleiri biðja um Nýggja Testamenti og aðrar bøkur, so vit senda nú 450-500 pakkar um vikuna. Um 12-15% teirra halda á við skeiðnum. Ein skúli hevur biðið um kristnar bøkur at hava á bókasavninum - hetta er eitt undur, og vit eru takksom! Tað frættist, at nógv nýggj trúgvandi verða doypt kring landið. Haldið á at biðja um ávøkstur. Annika fekk aftur innfararloyvi í eitt ár.

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

**FØROYAR**
- **Rutt og John í Skemmuni**
- **Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
- **Vanja og Svein í Prestgarði,**
  **Svend 15, Terji 11, Petra 9**



## *17. Týsdagur* *Áp. 17. 1-20*

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

Vit eru Gudi takksom, at fólk leggjast aftrat samkomu okkara hvørja viku. Arbeiðið at víðka um hølini gongur væl, men tað hevur skund. Guðrun og sonur okkara Tim hava bæði trupult við at finna arbeiði. Karina byrjar upp á eitt matveitingarskeið. Sonja trívist í Manchester, og Dan og Lydia eru um at falla til í Barcelona.

## *18. Mikudagur* *1. Sám. 16. 1-23*



**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 11, Emma 7**

Harrin signaði summarið – barnatiltakið í juni, ferðina til Filipsoyggjar við Megan í juli, og Parola bíbliuskeiðið í aug.

## *19. Hósdagur* *Sálm. 106. 24-48*



**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**

Samkomulega verður í heystfrítíðini, 19-22. okt. Biðið fyri leguni, og at Harrin signar Orð Sítt og samfelagið.

*Í dag fyllir Ester Mikkelsen 13 ár

## *20. Fríggjadagur* *Áp. 17. 21-34*

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 6, Timon 4**



Viðgongutíðin hjá Natalie gongur væl. Vit fara aftur til Týsklands at fyrireika okkum at taka ímóti tvíburunum. Tað gongur framá at læra kovolmálið. Biðið, at Andans ávøkstur grør í okkara lívi, verður sjónligur fyri kovolfólkinum, og at tey síggja Kristus í okkum.

*Í dag fyllir Debora Christiansen 8 ár
*Í dag fyllir Abigail Mortensen 5 ár

## *21. Leygardagur* *1. Sám. 17. 1-30*

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 13, Leah 9, Abigail 5**



Vit eru spent uppá hetta nýggja skúlaárið. Biðið, at vit fáa møguleika at brúka ein tøkan bygning í grannalagnum, at vit eru til signing fyri fólkið í okkara nærumhvørvi, at Gud letur hjørtuni upp, og at tey koma at kenna Jesus sum sín Frelsara og Harra.

**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**

## *22. Sunnudagur* *Áp. 18. 1-28*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**
Vit eru takksom fyri øll tey, sum eru løgd aftrat samkomuni seinastu tíðina, fleiri teirra úr Ukraina. Samkomuhølini eru ov trong, og tí byggja vit uppí. Serliga er tørvur á hølum til sunnudagsskúlan.



**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 11**

*Í dag fyllir Sarah Mortensen 13 ár

## *23. Mánadagur* *1. Sám. 17. 31-58*

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**
Cathy og eg eru í USA og vitja familju og samkomur. Vit fara til Filipsoyggjar um miðjan nov.

## *24. Týsdagur* *Áp. 19. 1-22*

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 7, Jude 5, Evelyn 3, Olivia 0**
Vit bíða her á Hoskins-trúboðarastøðini eftir boðum um, hvørjum

ættarbólki vit skulu virka í. Avgerð verður helst tikin í jan., tá økisleiðslan vitjar her. Biðið, at Gud gevur okkum tol at bíða og vísdóm at læra okkara børn at kenna Harran og fylgja honum.

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 15, Noah 14, Karis 10, Judah 8, Ethan 6**

*Í dag fyllir Natan Christiansen 5 ár

## *25. Mikudagur* — *1. Sám. 18. 1-30*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**



Ferðin til Dakar gekk væl, og eg fór beint á skeið í bíbliuumseting. Eg havi verið burtur leingi, so nógv skal gerast, áðrenn eg fari út aftur til Tongia. Vit fyrireika okkum, nú umsetingarráðgevin kemur fyrst í nov. at rættlesa 1. Mós. og fyrstu 7 kap. í Dán. Biðið, at alt gongst væl, og at málhjálpararnir verða tøkir og fúsir.

## *26. Hósdagur* — *Sálm. 107*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 2, Selah Rose 0**

Eg, Daniel, vitjaði Asmat-ættarbólkin á suðurstrondini á Papua fyrst í sept., og vit ætla at vitja bæði Asmat- og Turu-ættarbólkarnar áðrenn farloyvi í des. Biðið, at Harrin vísir, hvar vit skulu tæna. Vit vildu fegin verið liðug at læra indonesiska málið, áðrenn vit fara í farloyvi. Biðið, at pápi skal koma væl fyri seg eftir hjartaskurðviðgerðina.

## *27. Fríggjadagur* *Áp. 19. 23-41*

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Victoria 17, Emma Grace 15, Jónatan 14,**
**Markus 11, Evita 8, Joy 6**

Biðið, at vit eldru í samkomuni duga at taka okkum av teimum mongu, sum koma á møti, men ikki hava tikið stigið at geva sítt lív til Harran, og at vit vísa teimum Kristi kærleika.

## *28. Leygardagur* *1. Sám. 19. 1-24*

**FØROYAR**
**Else og Poul Johan Djurhuus**



Vit takka nógvu gestunum, ið gleddu okkum og familju okkara á gullbrúdleypsveitsluni 1. juli. Tað var ein signað løta, sum styrkti okkum øll. Harrin signi tykkum, og takk!

**- Anna Maria og Rógvi Joensen**
**- Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 14, Ester 13, Samuel 9**
**- Dora og Niels Pauli Nónstein, Andreas 14, Kristina 12**
**- Danjal og Synnøve av Rana, Benjamin 14, Anna Emilie 8, Lukas 3**

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 15**

## *29. Sunnudagur* *Áp. 20. 1-16*



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 11, Noah Kristian 9**

Vit halda á í tænastu okkara í The Well International, meðan vit eru í Hollandi. Biðið framhaldandi, at Eli fellur til her og finnur eitt andaligt heim.

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 15, Nana 11, Louie 9, Rio 4**

## *30. Mánadagur* *1. Sám. 20. 1-23*



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Takk fyri framhaldandi stuðul, hóast vit eldast, og orkan er minni enn fyrr. Pastor Musa og aðrir vinir Jesusar spyrja Gud, hvussu tey á bestan hátt kunnu brúka radio og sosialar miðlar til at luta Orðið.



| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## *31. Týsdagur* *Áp. 20. 17-38*

**BÓKATÆNASTAN**
Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

**NÝGGJ BÓK!**
**32 síður 130 kr.**

**– Ein sonn søga um, hvør Jesus veruliga er!**




Jesus reisti seg upp, har afturi í bátinum. Vindurin blásti enn. Aldurnar vóru størri enn nakrantíð. Vatn fossaði framvegis inn í bátin, skjótari enn lærusveinarnir orkaðu at oysa. Báturin var um at søkka! Men so gjørdi Jesus nakað ótrúligt.

Les hesa sonnu søguna og finn útav, hvør Jesus veruliga er! Myndprýdda bókin sigur søguna úr Markus kap. 4, tá Jesus hótti stormin. Frásøgnin lærir børn um Jesus, og um hvussu tey veruliga kunnu líta á Hann.

FORLAGIÐ LEIRKERIÐ
Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo